## GRANSKINGARDEPILIN FYRI ØKISMENNING
# SØKIR EFTIR GRANSKARA

Granskingardepilin fyri Økismenning søkir eftir granskara – búskaparfrøðingi, samfelagsfrøðingi, ella líknandi – at byrja skjótast gjørligt. Talan er um eitt verkætlanarsett starv, sum í fyrsta umfarið gongur fram til ársenda 2006.

**Arbeiðsuppgávur**
Arbeiðsuppgávurnar eru fjølbroyttar og fevna um ymiskar granskingarverkætlanir. Meiri ítøkiligt fevnir arbeiði m.a. um at fyrireika verkætlanir, savnað inn tilfar, viðgera, greina og tulka tilfarið og leggja tað fram skrivliga og munnliga.

**Vit kunnu bjóða**
Granskingardepilin fyri Økismenning er eitt spennandi arbeiðspláss við skiftandi granskingar uppgávum, fevnandi um føroyskar verkætlanir eins væl og verkætlanir, sum verða gjørdar í samstarvi við útlendskar granskarar og granskingarstovnar. Granskingardepilin fyri Økismenning átekur sær eisini umbidnar verkætlanir fyri stovnar og feløg í Føroyum og uttanlands.

Við starvinum fylgja eisini møguleikar at taka lut í altjóða ráðstevnum og verkstovum út í heimi eins væl og í Føroyum.

Granskingardepilin fyri Økismenning hevur skrivstovur í Vági og í Klaksvík. Arbeiðsstaðurin er í hesum førinum í Vági, men eru tó góðir møguleikar fyri lagaligum skipanum hesum viðvíkjandi.

**Førleikakrøv**
Umsøkjarar skulu hava lokið universitetsútbúgving innan búskaparfrøði, samfelagsfrøði, ella líknandi útbúgving.

Tað er ein fyrimunir – men ikki eitt krav – at ein hevur royndir sum granskari ella frá arbeiði í øðrum granskingarumhvørvum.

Vit vænta, at tú ert førir fyri at arbeiða sjálvstøðugt, umframt at samstarva við onnur starvsfólk í smb. við granskingarverkætlanir.

**Løn og setanartreytir**
Starvið verður lønt sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og avvarðandi fakfelag.

**Umsóknarfreist**
Umsóknarfreistin er 8. mars 2006. Umsóknir við prógvum, ævisøgu (Curriculum Vitae), viðmælum og øðrum skulu sendast:

**Granskingardepilin**
**fyri Økismenning,**
**Postboks 18**
**900 Vágur**

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Dennis Holm, á teldupostadressuni dennis@region.fo ella á tlf. 374477.

creaS 458006

**GRANSKINGARDEPILIN FYRI ØKISMENNING**
Postboks 18 • 900 Vágur • www.region.fo



# PEUGEOT 406 st.car.
Aut.gear og aircondition




ABS bremsur, Airbag, Alu-felgur, El-innstilling av forlyktum, El-spegl, Elrútar framman og aftan, Fløgubox vid 6 CD, Instilling á rættinum til cd, radio skifta cd og ljóðstyrki, Hita í setrum framman, Innstilling av ratti, Klimaanlegg, Power-stýring, Toklyktir, Tráleyst centrallás, Bordcomputer sum sigur frá um tad er hált og boðar frá feilum við bilinum, Píkadekk, Regnsensor.

**Prísur kr. 118.000,- ella hægstbjóðandi**

TEL 50 55 50


i Sosialurin


# SetHúsaSølan

Sp/f SHS · Tórsgøta 16 · Postboks 3156 · FO-110 Tórshavn
Fax 320 252 · sethusas@post.olivant.fo · www.sethusasolan.fo
Avgrei slutí : 10 - 13 á tel 210252
Skrivstovan opin: 13 - 16 tel 320252

NÝTT



**Froðba: Sethús til sølu**
matr.nr. 57 i, grundøki 990 $m^2$ bygd í 1980.
Húsini hava stoypta grund, yvirtromin úr timburi.
Tekjan er tjørupapp.
Húsini eru í 2 hæddum, 86$m^2$ hvør.
Á stovuhæddini er gong, stova, køkur, baðirúm, hjúnarrúm og kamar.
Kjallaran er óinnrættaður: Fýrrúm og stórt kjallararúm.
Húsini eru í góðum standi, alt innan í húsinum er gjørt av nýggjum tey síðstu 10 árini.
**Verður selt, um nøktandi boð verður givið**



**Hoyvík: Sethús við trimum stórum íbúðum til sølu**
Mannbrekka 1, matr. 1u, grundøki ca.1000 $m^2$.
Stór sethús, bygd uml.1976, við 4 góðum leigumálum. Húsini eru í tveimum hæddum. Betongdekk millum hæddirnar.
Stoypt kjallarahædd og miðhæddin træ, klødd við rotfríðum timbri. Veghæddin er uml. 176 $m^2$. innrættað: 1 íbúð uml. 80 $m^2$ við gong, stovu/køk, 2 stór kømur og wc við brúsu og vaskimaskinu, hurð frá stovuni út í garðin. Kjallarin er innrættaður við fýra rúmum, tekøkur, wc og hjalli, vælegnaður til verkstað.
Miðhæddin: uml. 176 $m^2$. innrættað: 1 íbúð uml. 110 $m^2$, gong, køkur, stova, 3 kømur, wc við brúsu og vaskimaskinu, felagsdurur og altan frá stovuni. 1 íbúð uml. 60 $m^2$, gong, køkur, stova, 3 kømur, wc við brúsu og vaskimaskinu, altan frá stovuni og felags durur.
Íbúðinar eru innrættaðar í 2001. Kring húsini er lendið regulerað við runnum og grasi og parkering.
Húsini eru í góðum standi, og hava ongar átrokandi ábøtur fyri neyðini. Húsini liggja væl fyri, sera vakurt útsýni yvir Hoyvíkina og Nólsoyar fjørð.
**Verða seld, um nøktandi boð verður givið**



**Sandavágur: Jørð til sølu**
Matr. 263, Sandavágur.
Stórt jarðarstykki til sølu. Stykkið er ein stór innhegnað trøð umleið 24.176 $m^2$.
Trøðin liggur væl fyri á Giljatrøðni, koyrast kann til, liggur beint omanfyri uppdyrkingarvegin.
Sera vælegnað til ross, gæs, seyð og annan fenað.
**Verður seld, um nøktandi boð verður givið**



**Haldarsvík: Sethús til sølu**
matr. nr. 120, Haldarsvík
Væl umsitin sethús uml. 111 $m^2$
í einari hædd. Bygd uml. 1980.
Húsini hava stoyptan sokkul, yvirtromin úr timbri, partvís nýggjan rotfríðan klæðning. Tekjan er eternit.
Húsini eru innrættað soleiðis: Gong, køkur, stova, goymslurúm, fýr/vaskirúm, hjúnarúm, trý kømur og baðirúm/wc. Baðirúmið er høvuðsumvælt í 2005 við gólvhita.
Úr stovu og køksvindeyganum er útsýni yvir á Slættaratind, Føroya hægsti fjallatindur.
**Verða seld, um nøktandi boð verður givið**

**Tórshavn: Sethús/og grundøkið ynskist**
Fyri ein av kundum okkara sóknast vit eftir sethúsum ella grundøki.
**Um onkur hugsar um at selja, vinarliga ring til Sethúsasøluna, ella støkk inn á gólvið.**

**Tórshavn: Lítil hús/íbúð, býtishandil, stór sethús**
Fyri ein av kundum okkara sum eigur eini stór sethús sóknast vit eftir minni húsum ella íbúð.
**Um onkur kundi hugsa sær ein býtishandil, vinarliga ring til Sethúsasøluna, ella støkk inn á gólvið.**

**Kollafjørður/Sundalagið:Sethús ynskist!**
Fyri ein av kundum okkara sóknast vit eftir sethúsum í Kollafirði.
**Um onkur hugsar um at selja, vinarliga ring til Sethúsasøluna, ella støkk inn á gólvið.**

Sosialurin 341800


Sosialurin
Sosialurin i